

Atlantic Petroleum verður skrásett á Oslo Børs í desember 2013. Mynd: Jógvan H. Gardar

# Ein fimtingur av virðinum er horvin farnu vikuna

**Jógvan Hugo Gardar**

11.08.2015 - 19:45

Oljan.fo

Tað er framvegis sera tungt hjá nógvum oljufeløgum á keypsskálunum. Við útlitinum til at oljuprísurin framhaldandi kemur at vera lágur, so minkar álitið á olju-partabrøvini.

Føroyska oljufelagið Atlantic Petroleum er eitt av feløgunum sum er hart rakt av at íleggjarar ikki tora ella ynskja at seta pengar í felagið sum støðan er.

Bara farnu vikuna er partabrævið hjá Atlantic Petroleum minkað við 21 prosentum í virði. Farna mánaðin er virði minkað við knøppum 28 prosentum.

Í dag er partabrævið selt fyri 32,10 norskar krónur. Hetta gevur Atlantic Petroleum eitt samlað virði, sambært keypsskálanum, uppá knappar 98 milliónir danskar krónur. Tá Atlantic Petroleum-partabrævið var í hæddini veturin 2013-2014, tá var virði á felagnum knappar 450 milliónir krónur. Hóast virði á felagnum er lækka munandi, so skal eisini

havast í huganum at felagið hevur selt burturav loyvunum sum tey høvdu á vetri 2013, nakað sum eisini ávirkar samlaða virði í felagnum.